## DAGSINS MEINING

# Til vildar øllum kann eingin gera

Mikukvøldið verður avgjørt, hvørji valevni Javnaðarflokkurin fer at stilla upp til løgtingsvalið í Suðurstreymoy. Helena Dam á Neystabø hevur meldað seg inn í Suðurstreymoyar Javnaðarfelag við tí fyri eyga at koma á listan hjá flokkinum. Hon, sum ein og hvør annar føroyingur er ivaleyst vælkomin sum limur í Javnaðarflokkinum. Um hinir limirnir so vilja stilla hana upp til løgtingsval, er so ein annar spurningur, ið Suðurstreymoyar Javnaðarfelag kemur at avgera.

Ein persónur, ið hevur verið formaður í øðrum flokki, og sum í sínum politiska virksemi hevur sína ábyrgd av, at Javnaðarflokkurin er hildin uttan fyri politiska ávirkan í fleiri ár, skapar eitt sindur av kjaki. Sjálvstýrisflokkurin flutti seg nógv longur burtur frá Javnaðarflokkinum, tá Helena tók við formanssessinum eftir Asbjørn Joensen sála. Var tað ikki hon, ið sleit samgonguna við Javnaðarflokkin í 94? Hvør minnist ikki eisini, hvussu Sámal Petur í Grund týggjaði sær í Tinganesi við Helenu sum floksformanni.

Tað er tí einki annað enn náttúrligt, at um somu tíð sum tað eru tey, ið síggja tað sum eina styrki at fáa Helenu á listan, eru tað eisini tey, sum meta hetta sum ein veikleika.

Er tað so, at ónøgdin millum javnaðarfólk er so stór við, at persónur, ið tók seg úr flokkinum á sinni, nú vil sleppa inn aftur frá degi til dags, er greitt, at Javnaðarflokkurin hevur ein trupulleika.

Tað er positivt, at Helena sigur seg taka undir við politikki Javnaðarfloksins, men vit loyva okkum at ivast í, um útmeldingarnar hjá henni eru nóg greiðar. Tað er nevniliga eingin loyna, at hon stuðlaði fullveldislinjuni hjá Tjóðveldisflokkinum, sum so eisini gjørdi, at nógvir av gomlu sjálvstýrisveljarunum vendu flokki sínum bakið.

Er tað ikki eitt sindur hálvhjartað, tá hon sigur, at hon vildi hava blokkniðurskurðin til 300 mill. kr. heldur enn tær 360, ið samgongan samtykti, tá hon veit, at Javnaðarflokkurin hevur gjørt greitt, at samfelagið ikki toldi, at blokkurin bleiv lækkaður við meira enn 100 mill. kr! Vit eiga ikki at undirmeta hesar 200 millimónirnar, sum uttan mun til hvussu tíðirnar vera koma at merkja fíggjarlógirnar framyvir.

Helena Dam á Neystabø hevur, sum øll onnur, loyvi til at broyta meining, men hon má skapa størri trúvirði um seg sjálvan í hesum sambandi. Tað hevur hon nú møguleika fyri at gera alment. Okkara bestu ráð til Helenu eru í nógv størri mun at leggja sjógv til ta víðgongdu fullveldislinjuna og liberlistisku kósina hjá samgonguni.

Um mótstøðan móti hennara kandidaturi eftir eina slíka sjálvrannsakan kortini er ov stór, so átti Helena Dam á Neystabø kanska at umhugsað støðuna. Tað eru bert fýra ár til næsta val. Óansæð, hvat Suðurstreymoyar Javnaðarfelag avger mikukvøldið, so verða fólk misnøgd, men tað skal vera okkara vón, at ein slík avgerð verður vird av øllum pørtum, so Javnaðarflokkurin kann fara í valstríðið sum ein maður.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Hvussu skulu grein 7 dagsstovnar hjá tí almenna fíggjast?

**Leivur Hansen**
*býráðslimur*



Løgmaður vil ikki fíggja ætlaða barnagarðin á Landssjúkrahúsinum við pengum úr landskassanum.

Hetta skilst á grein í Dimmalætting 30. januar, har blaðið hevur samrøðu við løgmann um ymisk viðurskifti í sambandi við økismenning. Frammanundan hevur landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum, Sámal Petur í Grund, eisini verið alment frammi og vent tummilfingrinum niðureftir í hesum sama máli.

Barnaansing er eftir teirra tykki horvin av fíggjarlógini með alla, eftir at kommunurnar hava yvirtikið fíggjarligu og umsitingarligu ábyrgdina av dagstovnaøkinum.

**Í tráð við lógina?**

Men er hetta nú heilt í tráð við andan í løgtingslógini um dagstovnar og dagrøkt frá 1. juli 2000? Ella við tað, ið farið er fram á hesum øki, síðani lógin kom í gildi?

Sambært grein 7, stk. 2, í barnagarðslógini (sum lógin eisini verður rópt) kunnu kommunurnar geva øðrum, td. fyritøkum og stovnum, loyvi til at stovnseta dagstovn.

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið verður m.a. grundgivið soleiðis fyri hesum:

"Í ávísum økjum í Føroyum hevur tað víst seg, at kommunan ikki kann nøkta tørvin á dagstovnaplássum í kommununi. Mett verður tí, at tað skal vera møguligt fyri onnur at taka seg saman um at gera ein dagstovn."

Hetta er greið tala - og tað sama kann sigast um lýsingina av, hvørji hesi "onnur" eru.

Har verður tikið soleiðis til í viðmerkingunum:

"Hesin møguleikin er serliga settur í lógaruppskotið fyri at ALMENNIR STOVNAR (mín undirstriking), privatar fyritøkur, einstaklingar ella onnur skulu hava møguleika fyri at bjóða sínum starvsfólkum eitt dagstovnapláss á m.a. arbeiðsplássinum".

**Rokning uttan vert**

Vert er at bíta merki í, at hvørki í lógini ella viðmerkingunum stendur nakað sum helst um, hvør skal bera kostnaðin av hesum stovnum.

Hesin spurningurin stóð tískil púra opin, tá umboð fyri Føroya Tele vendu sær til Tórshavnar kommunu (undirritaða, ið tá var borgarstjóri) við ynski um at fáa loyvi frá kommununi at gera slíkan dagstovn.

Tað eydnaðist okkum í góðum samstarvi rímiliga skjótt at koma ásamt um ein sáttmála, sum bæði býráðið og (leggið til merkis:) landsstýrið síðani góðtóku.

Sambært sáttmálanum skuldi Føroya Tele og Tórshavnar kommuna bera ávikavist 80 og 20 % av íløgukostnaðinum (tvs. byggikostnaðinum), meðan kommunan og foreldrini skuldu bera allar rakstrarútreiðslurnar - ávikavist 70 og 30 %, eins og galdandi er fyri allar aðrar dagstovnar.

Og eftir hesum leisti varð hesin fyrsti dagstovnurin av sínum slagi herfyri veruleiki.

**Landssjúkrahúsið svartiper**

Men nú ein annar almennur stovnur ætlar at taka táttin upp eftir

Føroya Tele, fær hann stólin settan fyri hurðina frá landsstýrinum.

Mótsatt Føroya Tele stendur Landssjúkrahúsið á løgtingsfíggjarlógini, og landskassin skal altso ikki hava nakað við barnaansing at gera longur!?

Men hevur landsstýrið við góðkenning síni av sáttmálanum millum Føroya Tele og Tórshavnar kommunu ikki í roynd og veru samstundis skorið leistin fyri fíggingini av øðrum líknandi dagstovnum - almennum sum privatum?

Ella hvussu hevur løgmaður ímyndað sær, at hesir §7-dagstovnarnir annars skulu fíggjast?

Vónandi fæst ein loysn á hesum máli sum skjótast, so eisini henda ætlanin kann verða veruleiki áðrenn langt umlíður.

# Sterk uppstilling?

**Eyðgunn Samuelsen**



Oddagreinin í Sosialinum leygardagin tann 2. februar 2002 leggur alstóran dent á, at vit mugu hava eina sterka uppstilling til komandi løgtingsval, men hvat inniber tað, hevur tað ikki eisini nakað við trúvirði til ein flokk og tann politik hann stendur fyri at gera?

Vit hava nú í 4 ár havt ein vælvirkandi tingbólk, ið hevur megnað at lyft andstøðuarbeiðið upp á eitt sakligt og seriøst støði. Fólk kring landið hava bitið merkið í, at Javnaðarflokkurin á tingið hevur gjørt eitt stórt og dygdargott arbeiði í andstøðu. Hetta skuldi verið eitt gott útgangsstøði til eitt komandi løgtingsval.

Seinasta gongdin í flokkinum, har framstandandi fólk úr øðrum flokkum fáa áheitan um at stilla upp fyri flokkin, kennist ørkymlandi fyri nógvar limir í flokkinum. Øll hava rætt at broyta meining, men at nýggjasti limurin í flokkinum skal standa sum fremsti verji av samhaldsføstu hugsjónini, er nýtt fyri mongum. Vit hava ikki sæð eitt einasta røktarheimspláss hesi 4 árini, men vit hava hoyrt nógv tos um fullveldi. Vit hava heldur ikki hoyrt, at samhaldsfesti var ein partur av tí tvungnu eftirlønini, ið henda samgonga, við okkara nýggja floksfelaga á odda, hevur arbeitt við nú í 4 ár, heldur tvørturímóti.

Tí mugu fólk síggja broytingar í verki yvir longri tíð, innan tey góðtaka, at fólk bara koma frá degi til dags á ovastu rók í flokkinum. Tað órógv og ivan um okkara trúvirði, ið hetta skapar, er ikki nakað, ið vit hava brúk fyri, nú vit skulu inn í eitt løgtingsval.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Eitt ára barsilsfarloyvi í eygsjón

**Elin Lindenskov,**
*býráðslimur í Havn*



Nú hava allir poltisku flokkarnir í Føroyum boðað frá, at teir taka undir við, at barnsburðarfarloyvið verður longt upp til eitt ár. Fráboðanin kom á pallborðsfundinum, sum Foreldrafelagið í Havn skipaði fyri, seinasta mikukvøld.

Hetta má sigast at verða stórtíðindi, sum vit føroyingar kunna frøast um. Vónandi gongur ikki long tíð, til eitt ára barnsburðarfarloyvið er veruleiki.

Áðrenn uppskotið um eitt ára farloyvi verður sett í verk, mugu vit gera okkum greitt, hvørjar avleiðingar eitt slíkt uppskot hevur. Avleiðingar fyri einstaku familjuna, fyri arbeiðsmarknaðin og fyri samfelagið sum heild.

**Familjuvinarligt**

Fyri einstaku familjuna er tað ein stórur fyrimunur, at barnið kann verða heima fyrsta árið. Vit eiga samstundis, sum barnsburðarfarloyvið verður longt, at útbyggja barnagarðdøkið, soleiðis at øllum børnum verða tryggjað pedagogisk tilboð frá tí degi, barnið er eitt ár. Tá vit hava nátt hesum máli, kunnu vit tosa um eitt familjuvinarligt samfelag.

**Páparnir mugu hava sín part**

Vit eiga at lógarfesta, at ávísir partar av farloyvinum eru til pápan. T.d. seinastu 3 – 6 mánaðirnir. Um pápin ikki brúkar farloyvið, eigur tann parturin av farloyvinum at detta burtur. Við at lógarfesta partar av farloyvinum til pápan, verður tað nátúrligt, at menninir eisini eru burtur frá arbeiðsmarknaðinum eina tíð. Sum nú er, skal pápin, um hann vil brúka sítt barnsburðarfraloyvið, taka tær vikurinar frá mammuni. Um pápin ikki fær sín part tryggjaðan við lóg, kann ein vansi fyri kvinnuna verða, at hon verður enn meira burturi frá arbeiðsmarknaðinum, og harvið styrkja vit mismunin millum kynini.

Fyri arbeiðsmarkanðin er tað tí eisini neyðugt, um farloyvið verður longt, at tað verður býtt millum kynini.

**Sparing og betri trivnaður**

Við at leingja farloyvið útseta og minka vit um tørvin á dagstovnum. Í Tórshavnar kommunu standa í løtuni umleið 200 børn millum eitt hálvt og eitt ár á bíðilistanum til dagstovn. T.v.s. at bíðilistin hevði minkað niður um eina helvt, um farloyvið var 12 mánaðir. Hetta merkir so aftur eina sparing bæði fyri kommununa og einstaku familjuna. Familjan sparir eitt hálvt ársgjald av stovnsplássinum, meðan kommunan sparir íløguna og raksturin av eini 4 –5 stovnum.

Ein slík sparing á vøggustovupláss um eigur at verða brúkt til at útbyggja Frítíðarskúlaskipanina, soleiðis at skipanin verður víðkað til eisini at umfata børn í øðrum og triðja flokki.

# Aldurdómur uttan MVG

**Heðin Mortensen**
*løgtingsmaður*



Føroyskir pensjónistar hava ikki ov nógv at liva av. Tann sera avmarkaða pensjón, teir fáa frá landinum, røkkur ikki langt.

Tað er at "føje spot til skade", at landið samstundis tekur pensjónina innaftur ígjøgnum skattin.

Fyri pensjónistin er tað tað sama, um skatturin eitur inntøkuskattur, ella hann eitur meirvirðisgjald, ella okkurt heilt triðja.

Føroyskir pensjónistar vóru ungir í teimum tíðum, tá nærum eingin hevði ráð til nakran lestur, og fá fingu nakra formliga útbúgving. Hóast tað bygdu tey hetta land, virkaðu og rindaðu sín skatt.

Umstøðurnar tá loyvdu ikki pensjónsuppsparing. Yngru ættarliðini í dag framferðarhátt nýta vit hava fyri stóran part lut í eini pensjónsskipan, sum fer at gera teimum lívið léttari, tá aldurin kemur.

Hóast inntøkurnar eru smáar vilja pensjónistarnir fegnir gjalda fyri seg, útvarp, sjónvarp, olju og el. Men tá MVG verður lagt á hesi gjøld, gerst húsarhaldið ov tungt. - MVG'ið ber til at taka av hesum vørum og tænastum við at leggja eina kodu inn í telduskipanina, so vøran til tann pensjóneraða kundan verður skrásett sum "ikki MVG-skyldug". Hetta klára allar telduskipanir. Henda framferðarhátt nýta vit longu, tá talan er um busskort. Eitt einfalt prógv fyri, at viðkomandi er pensjónistur, so verður ein annar prísur kravdur av sær sjálvum.

Við einum metstórum yvirskoti í landskassanum eiga vit at lata ein skattalætta, sum merkist hjá teimum, sum mest tørva. At lætta um hjá teimum eldru á henda hátt er ikki meir enn sømiligt.

# Nýtt javnaðarfelag í Suðuroy

VALFELAG
*Tíðindaskriv*

Sunnudagin 3. februar 2002 var stovnandi aðalfundur á Tvøroyri av nýggjum javnaðarfelagi fyri norðari helvt av Suðroynni.

Felagið, sum eitur Suðuroyar Norðara Javnaðarfelag, kemur í staðin fyri tey trý feløgini Froðbiar Sóknar Javnaðarfelag, Tvøroyrar Sosialdemokratiska Felag og Hvalbiar Javnaðarfelag og er fyri bygdirnar Fámjin, Tvøroyri, Hvalba og Sandvík.

Fundurin, sum var sera fjølmentur, samtykti nýggja felagslóg og valdi nevnd fyri nýggja felagið, sum eisini avloysir tey trý gomlu feløgini sum limur í Føroya Javnaðarflokki.

Í nevndini sita:
Ketty Andreasen, Tvøroyri formaður
Ruth Midjord, Hvalba næstformaður
Solveig Bærendsen, Trongisvágur kassameistari
Martin S Eidesgaard, Tvøroyri skrivari
Pauli Einarsson, Trongisvágur
Elisabeth Matras Olsen Tvøroyri
Manne Næs Hvalba

Felagið hevur boðað til fyrsta uppstillingarfund til løgtingsvalið komandi sunnudag, sigur Suðuroyar Norðara Javnaðarfelag.

# Viðvíkjandi barnaansing á Landssjúkrahúsinum



**Jógvan við Keldu**
*løgtingsmaður*

Seinastu tíðina hevur veruligt orðaskifti tikið seg upp, og áhaldandi trýst hevur verið lagt á bæði frá áhugabólkum og landspolitikarum í Suðurstreymi um, at neyðugt er hjá landskassanum at leggja uppí fyri at fáa barnaansingina í Havnini økta við einum ansingarstovni á Landssjúkrahúsinum.

Tað er ikki meira enn stívligt ár síðani greið avtala varð gjørd millum land og kommunur, at kommunurnar *einsamallar* skuldu taka sær av barnaansingini, og greitt fíggjarligt býti varð framt.

At Føroya Tele, sum er eitt "alment-privat" felag - hvat tað so er - slapp ígjøgnum nálareyga við einum landskassa-goldnum ansingarstovni viðvíkjandi íløgu, var ikki rætt eftir lógum og ætlan løgtingsins og landsstýrisins. – Men hetta er nú veruleiki.

Nú fáa vit "kropp á kroppi" landsalmennar stovnar í Suðurstreymi, har álagt verður landskassanum at gjald íløguna. Komandi týsdag fer landsstýrið at viðgera ansingarstovn á Landssjúkrahúsinum.

Lat tað vera sagt, er nøkur kommuna før fyri at gjalda barnaansingina, er tað Tórshavnar kommuna. Bara frá Landssjúkrahúsinum fær hon í kommunuskatti einar 35 mill. krónur, umframt alt tað sum hetta annars gevur av sær.

Eg fari sum samgongutingmaður at biðja landsstýrið og samgonguna um at umhugsa hetta mál meira gjølla, og gera sær greitt, hvørjar avleiðingar hetta kann fáa, eisini úti um landið, haðandi krøvini nú fara at koma.

Tað undrar meg annars, at kommunuumboðini t.v.s borgarstjórarnir í Kommunusamskipan Føroya í øllum førum umboðini úr Klaksvík, Runavík, Tvøroyri, Vági og Fuglafirði bara stilt tigandi lata hetta fara aftur við borðinum. – Hetta er ein djúpur órættur móti øðrum kommunum.

Annað mál er so, at tingfólk í Suðurstreymi ikki skilja, at løgting og landsstýri ikki eisini loysa íbúðaneyðina fyri Tórshavnar kommunu. Er tíðin ikki komin hagar, at samgongan í upp aftur størri mun tekur heildina upp, nú arbeiðið og í tí sambandi eisini fólkið er við at trunkast saman á einum staði, hækkar kostnaðarstøðið og økir trupulleikarnar í ábyrgdarleysan mun.

Eg heiti tí á løgmann sum umsitur kommunumál, landsstýrismann í heilsumálum og á alt lands-stýrið, um at ansað eftir hvat nú verður gjørt, nú so stutt er eftir av hesum valskeiði, tí trupulleikarnir innan barnaasning á heilsuøkinum aðrastaðni í Føroyum eru ikki minni enn á Landssjúkra-húsinum.

## Úr indiskari avís, Daily India, 1. februar 2002

*Vit eiga nóg mikið av tilfari til at fara í kríggj.*
*Vit eiga nóg mikið av tilfari til at gera eina kjarnorkubumbu.*
*Hví eiga vit ikki nóg mikið av tilfari til at gera ein álítandi politikara.*

Lestliga týtt

**Jan á Argjaboða**
**Nepal**